# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Petur Jacobsen, Tórshavn:

## 30 ára starvsdag hjá Tórshavnar Sløkkiliði

Mikudagin 15. desember 2004 hevði Petur Jacobsen starvast 30 ár hjá Tórshavnar Sløkkiliði.

Hann fekk starv sum fastur brandmaður hjá Tórshavnar Sløkkiliði 15. desember 1974 á Brandstøðini við Varðagøtu.

Petur er í dag 64 ára gamal. Hann er útbúgvin elektrikari, lærdi hjá Leif Mohr.

Hann koyrdi við egnum hýruvogni á bilstøðini Taxa í Havn fyrst í 60-unum. Eisini arbeiddi í Thule í eitt ár og sigldi úti við skipum hjá DFDS.

Áðrenn Petur fekk starv á Brandstøðini, arbeiddi hann í sjey ár hjá elfelagnum SEV.

Hann hevur arbeitt undir sjey brandmeistarum, teir eru: Símun Poulsen, Hilmar Johannesen, Heri Weihe, Erland Joensen, Brandur Fríðmundsson, Peter Seloy, og Kartni Jacobsen, sum er brandmeistari í dag.

Petur sigur, at honum hevur dámt arbeiði væl, Brandstøðin er eitt gott arbeiðspláss. Arbeiðið er ógvuliga fjølbroytt, tað kann vera spennandi og avbjóðandi og ikki altíð so tespiligt, men sanniliga eisini nógvar góðar løtur.



*Petur Jacobsen hevur arbeitt sum fastur brandmaður í 30 ár. Her er hann saman við Kartna Jacobsen, brandmeistara (v.m.), og Jan Christiansen, borgarstjóra í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Dagurin

**24. desember. Ádam.** Eftir bíbliuni fyrsti maður (1.Mós. 2-5). Navnið er helst sett til jólaaftan sum mótsetningur til Kristus, hin annan Ádam, dagin eftir.

Navnið merkir *maður, menniskja*, er gjørt eftir orði, ið merkir *jørð, akurjørð*.

**25. desember. Jóladagur.** Tað var í 4. øld, at teir samdust um at taka 25. desember til føðingardag Jesu. Annars hava teir víst á, at eftir ymiskum søguligum hendingum og persónum er Jesus føddur eini 7 ár fyri okkara tíðarrokning.

Tað er líkt til, at teir hava valt henda dagin sum ein mótsetning til tær heidnu háveturs- og sólkomuveitslurnar, sum hildnar vórðu um hetta mundið.

Hjá Norðbúgvum hevur hetta svarað aftur, og tann kristna høgtíðin er komin í staðin fyri tað gamla heidna jólahaldið.

**26. desember. 2. jóladagur. Stefan.** Hildin til minnis um fyrsta kristna pínsluváttin (Ápostlasøgan kap. 7). Grikska navni Stephano merkir *heiðurskransur, krúna.*

**27. desember. Jóhannes evangelistur.** Ápostulin og evangelisturin prædikaði eftir at ápostlarnir skiltust í Lítluásiu. Hann livdi eina tíð í Efesus. Á oynni Patmos skrivaði hann Opinberingina. Halgisøgan sigur, at hann doyði í Róm á 90 ára føðingardegi sínum 27. desember.

Joannes er grikst navn eftir tí hebráiska Johanan, sum merkir *Harrin er náðigur.*

### Føðingar

7. oktober fingu Una Hnasen og Jákup Pauli Jacobsen, Æðuvík, ein son. Hann var 36 cm langur og vigaði 1250 gr.

17. desember fekk Jóhanna Arge, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3695 gr.

18. desember fingu Fríða og Jógvan Højbro, Fuglafirði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3900 gr.

18. desember fingu Birna Henriksen og Jákup Haraldsen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3080 gr.

19. desember fingu Sheila Petersen og Sonni á Horni, Fuglafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3950 gr.

20. desember fingu Anja Heinadóttir og Bogi Hammer, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3100 gr.

### Andlát

14. desember
Kára Djurhuus, Toftir, 55 ár.

15. desember
Hanna Sigurðgeirson, nevnd Hanna hjá dekninum, ættað úr Sandavági, 101 ár.

17. desember
Steinar Waag, keypmaður í Reykjavík, 72 ár.

18. desember
Dánjal Petersen, Fuglafjørður, 70 ár

19. desember
Maria Friðbergsson, búsitandi í Reykjavík, ættað úr Tarti í Oyndarfirði, 96 ár.
Helena Mørk Hjelm, Vági, ættað úr Havn, 92 ár.

20. desember
Jens Jacob Strøm, Sandvík, 84 ár.